UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Endurlýsing av stuðli til myndlistafólk

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2021 er peningur settur av til myndlistafólk. Stuðulin verður umsitin við heimild í løgtingslóg nr. 60 frá 17. mai 2005 um stuðul til mentan og list v.m.
Av tí at allur stuðulin ikki varð lutaður út, tá stuðulsumfarið 15. mars var úti, verður lýst aftur við stuðlinum. Stuðulin til myndlistafólk verður játtaður einstaklingum til útbúgving, eftirútbúgving og námsferð.

Tá stuðul verður játtaður, verður í fyrstu atløgu raðfest at veita yrkislistafólkum stuðul og í aðru atløgu umsøkjarum, ið eru á eini listarligari yrkisleið. Játtanin er kr. 150.000, og av hesum eru 114.000 kr. tøkar at søkja í hesum eyka umfari.

Freistin at søkja er 17. mai 2021

Umsóknir eiga at verða skrivaðar á serstakt umsóknarblað til endamálið. Umsóknarbløð og vegleiðingar eru at finna á heimasíðu okkara: *www.ummr.fo* ella kunnu fáast við at venda sær til:


**Uttanríkis- og mentamálaráðið**
**Postrúm 3279 - 110 Tórshavn**
**Telefon 30 65 00 – Telefax 30 65 55**
**e-postur.: ummr@ummr.fo**